

Mia Káradóttir, sum spælir tvørfloytu, fekk eisini gávuðgóðs upp á 15.000 kr frá Jacob Gade Fonden



Formaðurin í Symfoniorkestrinum, Poul Jákup Thomsen, tekur ímóti gávugóðsinum upp á 50.000 kr frá Jacob Gade Fonden

variera, tó við nøkrum fáum meira miðleysum pørtum.

## Virðislønir frá Jacob Gade grunninum

Eftir framførsluna kom Holger Bisgaard, formaður fyri Jacob Gade grunnin, fram á pall at halda røðu. Hann greiddi frá pørtum av lívsleiðini hjá Jacob Gade (1879-1963), frá Vejle til Keypmannahavn og víðari til New York og um, hvussu kendasta verkið hjá Jacob Gade "Tango Jalousie" gjørdist kent um allan heim, aftaná at tað var innspælt í 1938. Floytuspælarin Mia Káradóttir og violinleikarin Heiðrun Petersen fingu báðar virðisløn á 15.000 kr. hvør, og Symfoniorkestrið eina á 50.000 kr. og musikkskúlin fekk fleiri virðismikil ljóðføri til láns frá grunninum. Síðan tók Toke Lund næstformaður í grunninum orðið og at enda takkaði Bo Isholm leiðari á Tórshavnar Musikkskúla grunninum fyri sýndan heiður. Síðani var farið víðari í skránni.

## Tríggir solistar og Symfoniorkestrið

Klaverkonsertin hjá Grieg (1843-1907) í A-mol er eitt sera vældámt og kent verk. Talan var nú um romantiskan tónleik. Verkið er frá 1868 og er einasta lidna klaverkonsertin hjá honum. Hann arbeiddi við at gera eina klaverkonsert i H-mol í 1882-83, men hon gjørdist ongantíð liðug. Klaversolistur var Elisabeth Westenholtz, sum hevur spælt í Føroyum áður. Elisabeth Westenholtz var vælleikandi og samspælið millum dirigentin Bernhard Wilkinson, orkestur og klaverleikaran riggaði heilt væl, tá temaið skifti frá orkestri til solist og umvent. Verkið er í trimum satsum, fyrsti satsur hevur eitt sermerkt byrjannar-tema. Í 2. satsi, sum var meira stillur, var leikluturin hjá klaverinum nakað minni, meðan 3. og síðsti satsur var meira léttur og lívligur og partvíst dramatiskur. Seinni í hesum satsi kom eitt vakurt tema, fyrst í orkestrinum og síðani í klaveri. Satsurin broytist rútmiskt á ein áhugaverdan hátt til síðst. Hesin satsur fer niður í tempo í finaluni, men verkið endar við øllum orkestrinum, bæði strúkarum, blásarum og paukum endar við stórari styrki í A-dur. Aftur ein væleydnað framførsla bæði hjá orkestri og solisti.

Tá Mia Káradóttir kom á pallin við tvørfloytu at framføra Andante í C-dur hjá Mozart, hevði konsertin vart í næstan 2 1/2 tíma. Mia Káradóttir spældi væl og hevði eitt vakurt vibrato í sínum spæli. At enda framførdi orkestri saman við Heiðrun Petersen "Tango Jalousie" hjá Jacob Gade. Hon spældi reint og sannførandi, við góðum tóna, á violinina.

## Lurtarin avbjóðaður stílsliga

Samanumtikið var talan um eina fjølbroytt samansetta skrá. Tað var eitt sindur trupult at síggja tann reyða tráðin í vali av verkum.

Ein so fjølbroytt skrá krevur eisini nógv av áhoyrarunum stílsliga. Alt í alt ein tónlistarliga væleydnað konsert, har vit hoyrdu gamlar og nýggjar tónar frá bæði ungum og royndum tónleikarum. Eisini var hugaligt at síggja, at talið av yngri tónleikarum í Symfoniorkestrinum er støðugt vaksandi.





